**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Opið er:
Mánadag og mikudag
kl. 13.30-17.30.
Týsdag og Hósdag
kl. 9.30-17.30
Teldupostur:
dagtilhaldid@post.olivant.fo
***Mánadag***
Tilmeldan til døgurða týsdag áðrenn kl 17.00 á tlf. 459091
***Týsdag***
kl. 9.30 Gongutúrur
kl. 11.00 bløðini verða lisin fyri sjónveikum
kl 12.00 Døgurði
***Mikudag***
kl. 13.30 Telda
***Hósdag***
kl. 10.00 fimleikur
kl. 11.00 telda
kl. 13.30 bløðini verða lisin fyri sjónveik
*Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks.*
*Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.*
***Hvør dagur endar við andakt og sangi.***
***Øll eru hjartaliga vælkomin.***

**Eldrafelagið Nón**
Í vetur koma vit saman til handaligt arbeiði hvønn týsdag frá kl. 15.00 til 18.00.

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Frits Jacobsen, tlf. 332053 ella ein av nevndarlimunum.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

**Spælistovan í Margarinufabrikkini**
Opið er mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri børnum/foreldrum uttan ansing.

**Rúslinjan hjá Bláa Krossi**
er opin týsdag og hósdag frá kl. 19.00-21.00. Tlf. 318586.

**Opin ACA-fundur Tinghúsvegur 37, Havn**
(Tilkomin hjá alkoholikarum og vantrivnaður, dysfunktionellum, familjum). Leygardag kl. 11.00-12.00 á Tinghúsvegi 37 í Havn.

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.00 Stóri bókafundur
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00.
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20. Sunnudag kl. 17.00. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**Al-Anon**
fundur er hvørt týskvøld kl. 21.00 í Havnaskrivstovuni í Runavík.

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 16.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.

Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**50 ára føðingardagur**
Sunnudagin tann 30. juli høvdu Kristin og Poul Juul Michelsen, Froðba 50 ára føðingardag. Føðingardagurin verður hildin í ítróttarhøllini í Trongisvági leygardagin 14. oktobur 2006 kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 371254 ella 372351 áðrenn 9. oktobur 2006.

Týsdagin 26. september verður Laila í Garðinum, Klaksvík, 50 ár. Opið hús á Bumshamarsvegi 42 frá kl. 13.00.

**75 ára føðingardagur**
Tann 6. oktober verður Steingrím Samuelsen, Sevmýri, 75 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 7. oktober á Gistingarhúsinum í Øravík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða Steingrím við at koma, verða biðin at siga frá áðrenn 1. oktober á tlf. 371166.

**Brúdleyp**
Leygardagin 23. september giftast í býráðssalinum í Havn Ruth á Bøgarði, Kaldbak, og Bjarni Samson, Tórshavn. Tey, ið vilja hitta brúðarparið, eru vælkomin inn á Bø í Kaldbak kl. 21.00.

Fríggjadagin 22. september giftast á Dronninglund Slot Sólvá Jacobsen, Tórshavn og Walther Skræp úr Vodskov. Brúdleypsadr.: Dronninglund Slot, Slotsgade 8, 9330 Dronninglund.

Leygardagin 14. oktober kl. 15.00 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík Hjørdis Sivertsen, Norðdepli og Brian Hansen, Kalundborg. Vælkomst verður kl. 21.00 á Hotel Norð. Tey, ið ynskja at halda dagin saman við okkum, kunnu siga frá á tlf. 452129 ella 211029 seinast 1. oktober.

Leygardagin 14. oktober kl.16 giftast í Sands kirkju Beinta Fríðbjørg Simonsen og Erling Guðlaugur Arnarson ættaður av Akranesi. Veitslan verður í Virkinum kl. 19 fyri innbodnum.

Leygardagin 14. oktobur 2006 kl. 14.00 giftast í Betesda, Karin Maria Purkhús og Sjúrður Reginson Kunoy. Eftir vígsluna verður reseptión í kjallaranum í Betesda til kl. 17.00. Øll eru hjartaliga vælkomin. Døgurðin verður fyri innbodnum kl. 19.00 á Klaksvíkar Sjómansheimi.




# Leiðari til kunningardeildina

Tórshavnar kommuna sóknast eftir einum leiðara at standa á odda fyri kunningardeildini.

Kunning og samskifti eru lyklaorð á kunningardeildini, og við hesum í huga royna vit at menna og skapa bindiliðið millum borgaran, kommununa og ta politisku skipanina.

Á kunningardeildini hava vit m.a. ábyrgdina av tíðindaflutninginum, kunningarritunum, heimanetinum, lýsingum, heimasíðuni, PR-arbeiðinum, lýsingarátøkum og allari kunning til borgaran.

Tú verður ein partur av einum toymi, sum er samansett av grafikara, samskiftisfólki og fjølmiðlafólki.

Sum leiðari fært tú ábyrgdina av at samstarva við hinar deildirnar, har tín lutur verður at arbeiða tvørtur um mørk og tryggja fær kunning um virksemið hjá Tórshavnar kommunu. Harumframt fært tú ábyrgdina av at menna kunningardeildina og starvsfólkini har sum heild og at leggja kunningarpolitikkin hjá kommununi til rættis.

Arbeiðsuppgávurnar verða í høvuðsheitum at virka sum fjølmiðlafólk. Tú skal vera virkisfús/ur og ágrýtin og skjótt kunna orða stutt tíðindaskriv og eisini gera longri frágreiðingar. Kunningarrit verða partur av tínum gerandisdegi og tú kanst eisini koma út fyri at skriva røður.

Vit vænta, at tú hevur journalist- ella aðra viðkomandi útbúgving, og at tú ert framsíggin og positiv/ur. Harumframt skal tú hugsa sjálvstøðugt og trívast í einum skapandi umhvørvi við evstumørk.

Talan er um eitt fulltíðarstarv, ið verður lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Starvsmannafelagið í 8. lønarflokki, umframt viðbót fyri meirarbeiði uttan fyri vanliga arbeiðstíð. Starvið verður sett skjótast gjørligt.

Meira fæst at vita við at venda sær til Bjørgfríð Ludvig, midfyrisitingarstjóra, ella Heðin Mortensen, borgarstjóra, á tlf. 302010.

Umsókn saman við dømum um gjørd tíðindaskriv ella annað tilfar, próvskjølum, viðmælum og upplýsingum um arbeiðsroyndum skal vera Tórshavnar kommunu, postboks 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 9. oktober 2006 kl. 12.00. Viðmerkið umsóknina „Leiðari til kunningardeildina".

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo/leysstorv**

Tórshavnar kommuna






Stuðulsfólkaskipanin fyri børn er skipan á Almannastovuni, sum veitir stuðul til heimabúgvandi, ið bera brek.

Stuðulsfólkaskipanin fevnir um alt landið. Í skipanini starvast í løtuni umleið 100 fólk. Á Almannastovuni virka vit miðvíst fyri at lúka krøvini frá politiska myndugleikanum og viðskiftafólkunum. Dentur verður lagdur á høgt tænastustøði, rættartrygdina og virðingina fyri einstaklinginum, eins og virkað verður fyri áhaldandi at menna førleikan, trivnaðin og samstarvið á stovninum.

## Sóknast verður eftir stuðulsfólkum

- Søkt verður eftir stuðlum í Eysturoynni at arbeiða við fjølbrekaðum børnum. Arbeiðið kann vera rættiliga kropsliga krevjandi.
- Søkt verður eftir stuðlum í Suðurstreymoy, sum kunnu vera ungum fólkum við kropsligum brekum til hjálpar. Arbeiðið er m.a. at hjálpa ungum dreingjum, tá ið teir skulu svimja. Arbeiðið kann vera rættiliga kropsliga krevjandi.

Arbeiðstíðin kann vera skiftandi, men er í løtuni serliga í dagtímunum. Talan kann eisini vera um samansettar uppgávur. Tímatalið er í løtuni 30 - 40 tímar um vikuna eftir avtalu.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Joan Olsen ella Ragnhild Dahl, stuðulsráðgevar, tel 35 35 70.

Skrivlig umsókn, prógv og viðmæli skulu sendast til:

Stuðulsfólkaskipanina fyri børn, Almannastovan, Tinghúsvegur 14, Postboks 3096, 110 Tórshavn.

Umsóknarfreistin er 4. oktober 2006.

stuðulsfólkaskipanin fyri børn
www.almannastovan.fo

KREA.FO · TEL 47 80 80